# Tveir vinmenn og meistarar í skugganum

**Jákup Mikkelsen og Todi Jónsson hava nógv í felagi. Nú sita teir báðir á beinkinum og bíða eftir nýggjum avbóðingum**

JÓANNES HANSEN

Teir hava upplivað so nógv í fótbólti, sum kanska eingir aðrir føroyskir fótbóltsspælarar. Jákup Mikkelsen og Todi Jónsson vóru blaðungir, tá ið teir komu á 1. lið hjá KÍ, og teir vóru í 1991 við til at vinna fyrsta meistaraheitið till felagið í nítjan ár.

Todi Jónsson var fyrsti føroyingurin, sum royndi seg í donsku superliguni, og Jákup Mikkelsen kom honum á baki. Jákup Mikkelsen var fyrsti føroyingurin, sum vann danska meistaraskapin. Tað gjørdi hann við Herfølge. Síðani vann Todi Jónsson meistaraskapin við FCK.

## Í skugganum

Fyrst í apríl í ár stóðu teir andlit til andlit í venjingardysti. Molde var í Danmark á venjingarlegu, og teir spældu ímóti FCK. Síðani Jákup Mikkelsen og Todi Jónsson seinast høvdu spælt ímóti hvørjum øðrum, høvdu báðir mist rættin at spæla í fremstu røð. Felags royndin hevur verið, at tað gongur upp og niður í fótbólti, og at umhvørvið er ísakalt og eyðkent av, at tað eru pengarnir, sum hava nógv tann størsta týdningin, tá ið ætlanir verða lagdar og avgerðir tiknar.

Í FCK leiðsluni hava teir, sum verða mettir at vera heiðursmenn, staðið púra kaldir og sagt, at Todi er ikki nóg góður at spæla. Sannleikin er, at hann er útifrystur, tí hann hevur havt dirvi at lurta meiri eftir sær sjálvum, enn hann hevur viljað lurtað eftir leiðsluni í FCK. Leiðslan er firtin um, at hon ikki kundi kroysta Toda at skriva undir sáttmála, ið ikki gav ta samsýningina, sum Todi metti, at hann var verdur. Ivaleyst eisini við samsýningini í huga, sum FCK rindar øðrum spælarum.

Todi hevur verið í FCK í seks ár, hann er tann útlendingurin, sum hevur spælt flest dystir fyri felagið, hann hevur skorað flest mál av spælarunum, sum nú eru í FCK, og hóast hann ikki fekk nógva spælitíð í heyst, so megnaði hann at skora seks mál og harvið at verða næstbesti málskjúttin.

Men hetta hevur ikki víst seg at telja. Felagið hevur sett Toda í skammikrókin, og teir vildu ikki loyva honum at flyta til franska Lille í januar, sjálvt um hetta hevði havt við sær, at FCK hevði sloppið undan at rinda føroyska álopsspælaranum løn fram til 30. juni, tá ið sáttmálaskeiðið hjá FCK og Toda Jónsson er runnið.

Todi er við øðrum orðum vorðin gjørdur til dømi fyri framtíðar FCK spælarar um, hvussu illa tað fer at roynast ikki at ganga undir krøvini, sum leiðslan heldur vera rímulig.

– Eg eri noyddur at góðtaka tað, sum leiðslan ger av, meðan eg eri bundin at felagnum. Eg venji og spæli teir dystirnar, sum teir biðja meg spæla. Um brúk verður fyri mær á besta liðnum, so ræður um at vera klárur, tá ið møguleikin verður har, sigur Todi Jónsson, sum enn ikki veit at siga, hvar hann fer at spæla fótbólt eftir summarfrítíðina. At hann fegin vil sleppa at royna evnini onkra aðra staðni enn í Danmark, hevur Todi Jónsson ikki dult fyri.

## Berjist fyri møguleikanum

Jákup Mikkelsen hevur síðsta stóra árið kappast við Eddie Gustafsson um plássið millum stólparnar í Molde. Eftir tætta kapping síðsta vár, gjørdi svenski Molde venjarin av, at Eddie Gustafsson skuldi verja málið, og at Jákup Mikkelsen skuldi sita á beinkinum.

Eddie Gustafsson, sum í vár hevur verið á svenska landsliðnum fleiri ferðir, var í fjør kosin ársins spælari í Molde. Í vár hevur hann av teirri orsøk verið sjálvskrivaður fyrsti málverji. Men Jákup Mikkelsen hevur hildið á at trýsta svenska kappingarneytan.

– Eg eri sáttmálabundin at Molde fram til síðst í november í ár, og Eddie Gustafsson er sáttmálabundin eitt ár longri enn eg. Tað nyttar einki at lúta við høvdinum og at geva skarvin yvir. Eg venji eins nógv og hin málverjin, og í venjingardystunum í vár havi eg fleiri ferðir fingið møguleikan. Nú uppundir kappingarbyrjan hevur hann verið tikin framum meg. Men eg havi eina kenslu av, at munurin okkara millum er kanska minni nú, enn hann var í fjør, sigur Jákup Mikkelsen, sum neyvan fer at leingja samstarvið við Molde.

Føroyski málverjin í Molde sær landsdystirnar sum ljósglæmur, serliga tá ið hann bara spælir á eykaliðnum hjá Molde. Todi Jónsson hevur ikki verið á landsliðnum í meiri enn eitt ár, og hann hevur útsett avgerðina, um hann aftur skal spæla á landsliðnum.

– Hjá mær er tað ikki aktuelt at taka eina sovorna avgerð, tá ið eg ikki spæli á hægsta støði í felagnum. Í løtuni eri eg ikki í dystarvenjing at spæla á landsliðnum.





*FCK hevur sett Toda Jónsson í skammikrók, og hann kann ikki rokna við at sleppa at spæla nakað serligt á besta liðnum aftur.*

Mynd: Álvur Haraldsen





